


*Liðskipararnir á liðunum hjá EB/Streymi og NSÍ eru á einum máli um, at javnleikur var eitt rættvíst úrslit mánadagin*

*Mynd: Birita Hansen, www.nsi.fo*

# Liðskipararnir eru nøgdir

**FÓTBÓLTUR** Egil á Bø, liðskipari hjá EB/Streymi, og Christian Høgni Jacobsen, liðskipari hjá NSÍ, eru nøgdir við at fáa eitt stig burtur úr dystinum við Margáir

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 2 |
| NSÍ | 2 |

Vit vóru við yvirlutan í fyrra hálvleiki. Teir høvdu yvirvág eftir steðgin. Tað er rættvíst, at bæði liðini fáa eitt stig, heldur Egil á Bø, sum er liðskipari hjá EB/Streymi.

Vit høvdu fleiri málmøguleikar enn EB/Streymur, men at fáa eitt stig við Margáir er avgjørt nøktandi, heldur Christian Høgni Jacobsen, sum er liðskiparið hjá NSÍ.

Sundalagsmenn og runavíkingar, sum fingu heiðursmerki síðsta kappingarár, eru nøgdir við úrslitið og byrjanina upp á kappingarárið sum heild. Tað gera teir púra greitt.

10 stig í fýra landskappingardystum er nøktandi, sigur Egil á Bø. Christian Høgni Jacobsen er eisini fegin.

Vit hava sjey stig eftir dystirnar móti HB, Víkingi, B68 og EB/Streymi. Tað er eingin vanlukka, staðfestir hann.

## 10 stig í fýra landskappingardystum er nøktandi

EGIL Á BØ, EB/STREYMUR

### Eitt stig hvør

Jú, samdir liðskiparar. Tað vóru teir eftir øllum at døma eisini á vøllinum, tí Egil á Bø og Christian Høgni Jacobsen fingu eitt stig hvør í landskappingardystinum mánadagin. EB/Streymur var á odda í tveimum førum. Arnbjørn Hansen og Levi Hanssen vóru málskjúttar hjá sundalagsmonnum, og Klæmint A. Olsen og Debes Danielsen komu á máltalvuna fyri runavíkingar.

Egil á Bø heldur, at vindurin darvaði spælinum.

Vit spældu væl, sum fortreytirnar vóru. Vit høvdu undanvind fyri steðgin, og tað var kanska eisini orsøkin, at vit vóru meira á bóltinum. Tað broyttis Tað var nógvur vindur, og tað tók ferðina av spælinum. Eg eri væl nøgdur við avrikið, sigur Egil á Bø.

*uni@sosialurin.fo*

## Vit hava sjey stig eftir dystirnar móti HB, Víkingi, B68 og EB/Streymi. Tað er eingin vanlukka

CHRISTIAN HØGNI JACOBSEN, NSÍ

# Kava-dagarnir er munurin

**FÓTBÓLTUR** Heðin Askham hevur ikki lagt fyrireikingarnar øðrvísi tilrættis. – Tað hava ikki verið eins nógvir kavadagar í ár. Tað er umráðandi fyri okkum, sigur hann

Uni Holm Johannesen

EB/Streymur fekk bara fimm stig fyrstu fimm landskappingardystirnar í fjør. Keðiliga byrjanin var ein av høvuðsorsøkunum til, at sundalagsmenn vóru ov stuttir at vinna føroyameistaraheitið. Tann støðan er ikki íkomin í ár. EB/Streymur hevur lagt bragdliga fyri.

Heðin Askham, venjari, vissar hinvegin um, at hann hevur ikki gjørt nakað øðrvísi.

– Tað hava ikki verið eins nógvir kavadagar í ár. Tað er umráðandi fyri okkum. Vit hava vant við bólti mest sum allar venjingardagarnar, og tað sæst aftur í framrættaða spælinum, sum vit hugsa nógv um. Umframt tað, hava vit ikki eins nógvar skaðar í ár, sigur Heðin Askham.